Betra liðið vann, men eg ivist í um hasin dómarin var edrúur!
**Maður, 27 ár**

# Miðlamjørr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



*Tey vilja hava míná olju*
Libyski leiðarin Gadaffi heldur seg vita, hvat politiska trýstið á hann snýr seg um.



*Alt, sum er ókeypis, smakkar best*
Songkvinnan Anna Faroe tosar um yndismat (Sosialurin)



*At vera fráhaldsmaður við skemtilyndi*
Politikarin Óli Breckmann tosar um sína størstu styrki (Vikublaðið)



*Mær dámar væl at fara ørindi fyri konuna, men trupulleikin er, at eg elski at práta við fólk.*
Steinbjørn O. Jacobsen, fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík, ásannar, at konan má bíða eftir honum (Dimma)

Ein kendur maður segði við meg í dag (8. mars) "tá eg síggi eina kvinnu í sjónvarpinum, sum eg vil lurta eftir, so blundi eg. Annars hoyri eg hana ikki!"
**Kvinna, 42 ár**



*Øll menniskju eru fødd við eginleikanum at draga bæði kyn at sær.*
Songkvinnan Rihanna kundi ímyndað sær í einum forholdi við aðra kvinnu.

Her er ikki veður at ganga leysur í dag! Fy for den, sum her rullar illa í dag! Næstan so ringt, at man noyðist at hava trygdarbelti í koyggjuni!
**Maður, 33 ár**



*Sjálvandi eri eg til reiðar at verða løgmaður*
Aksel V. Johannesen, nýggjur formaður í Javnaðarflokkinum, var nóg illa politikari fyri einum góðum ári síðani (Sosialurin)

Ynskir øllum ein góðan mikudag. Spennandi at vita, um ikki okkurt afturat verður bannað í kvøld, sum var loyvi í morgun.
Maður, 45 ár